Í Sosialinum í morgin
verður eitt stórt eykablað
um BILAR







# Ríkismyndugleikar hava brotið galdandi rætt



*Fólkaræðisliga er talan um eindømi í nýggjari føroyskari søgu, heldur løgmálaráðið við Høgna Hoydal á odda, sum vil hava danskar myndugleikar um at taka hernaðarlógirnar av aftur beinanvegin.*
*Mynd: Jens K. Vang*

**Føroyska løgmálaráðið hevur mótmælt hjá donsku stjórnini, at hon hevur sett hernaðarlógir í gildi fyri Føroyar uttan at spyrja føroyingar eftir – og enntá beint ímóti einari løgtingssamtykt. Ríkismyndugleikarnir hava brotið galdandi rætt, skrivar Høgni Hoydal, landsstýrismaður**

HERNAÐARMÁL
*Ingi Rasmussen*

Hann dregur aftur á luftina í viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark.

Atvoldin er, at danska stjórnin hevur sett danskar lógir í gildi fyri Føroyar beint ímóti einari løgtingssamtykt. Síðsta orðið er ikki sagt.

Tað var forsætismálaráðið, sum álegði ríkisumboðnum at seta nýggjar lógir fyri hervaldið í Føroyum í gildi, hóast løgtingið einmælt samtykti 21. november 2001, at hernaðarligu revsilógirnar skuldu takast av og ongar setast í staðin.

Í løtuni viðger løgtingið eitt uppskot til ríkislógartilmæli frá Javnaðarflokkinum um at taka lógirnar av aftur. Og í vikuni, sum fór, sendi løgmálaráðið eitt hvassorðað mótmæli til ríkisumboðið í Føroyum. Tað vil siga til donsku stjórnina.

Í brævinum, sum Høgni Hoydal hevur skrivað undir, verður staðfest, at ríkismyndugleikarnir hava brotið vanligar siðvenjur í hesum máli. Sagt verður, at framferðin hjá donsku stjórnini »er ikki í samsvari við fatanina hjá løgmálaráðnum í Føroyum av rættarstøðu føroyinga«, og at »løgmálaráðharrin metir málið sera álvarsligt«.

## Brot á siðvenju

Víst verður til grein 7 í heimastýrislógini, sum sigur, at ríkismyndugleikarnir skulu leggja ríkislógir, sum viðvíkja føroyskum viðurskiftum, fyri heimastýrismyndugleikarnir til álitis, áðrenn tær verða settar í gildi í Føroyum. Tað hevur eisini verið vanlig mannagongd higartil.

At løgting og landsstýri eisini hava hildið hesa mannagongd vera ófrávíkiliga sæst eisini av grein 47 í stýrisskipanarlógini, sum ásetir, at áheitan um at seta í gildi fyri Føroyar ríkislóg bert kann vera gjørt við ríkislógartilmæli, sum skulu hava tríggjar viðgerðir á Føroya løgtingi.

– Tann siðvenja, ið er íkomin, og sum er staðfest í grein 47 í stýrisskipanarlógini, er tí at meta sum galdandi rættur. Tí verður staðfest, at ríkismyndugleikarnir hava brotið vanligar fyrisitingarligar grundreglur í hesum sambandi, skrivar Høgni Hoydal, landsstýrismaður til donsku stjórnina.

## Demokratiskt eindømi

Men málið er sambært landsstýrismanninum meira álvarsligt enn eitt fyrisitingarligt brot. Málið er reist av Høgna Hoydal sjálvum, og løgtingið samtykti einmælt hansara tilmæli um, at hernaðarligu revsilógirnar skuldu takast av og onki setast í staðin.

– Tí hava ríkismyndugleikarnir í hesum føri ikki bert brotið galdandi siðvenju og rætt við at lýsa lógir og kunngerðir fyri Føroyar. Í hesum føri er gingið beint ímóti einari einmæltari løgtingssamtykt í einum máli, sum føroyskir myndugleikar sjálvir hava reist, skrivar Høgni Hoydal. Fólkaræðisliga er málið helst eindømi í nýggjari søgu føroyinga, heldur Høgni Hoydal, og hann heitir í brævinum á ríkismyndugleikarnar um beinanvegin at rætta skeivu framferðina og at seta nevndu ríkislógirnar úr gildi, soleiðis at málið kann fáa eina rætta viðgerð.

## Noktar at gjalda

Sambært galdandi skipan fyri kunngerð av ríkislógum, verða ríkislógir settar í gildi fyri Føroyar kunngjørdar í Kunngerðarblaðnum B, sum landsstýrið gevur út og rindar fyri. Tað er eisini hent í hesum føri. Ríkisumboðið hevur sent Kunngerðarblaðnum lógirnar til kunngerðar uttan at spyrja landsstýri og løgting eftir. Men Høgni Hoydal hevur givið sínari umsiting um ikki at rinda rokningina.

– Ein fyritreyt fyri, at landsstýrið rindar fyri kunngerð av ríkisløggávu í Føroyum, er, at galdandi rættur í slíkum málum verður fylgdur. Sagt verður frá, at landsstýrið ikki ætlar at gjalda fyri útgávuna av Kunngerðarblaðnum B, hefti 5, 2003, har ið nevnda ríkisløggáva er kunngjørd, skrivar Høgni Hoydal.

### Fakta

Málið um donsku hernaðarlógirnar í Føroyum tók seg upp, tí víst varð á, at tann gamla hernaðarliga revsilógin frá 1937 loyvdi deyðarevsing í krígstíð í Føroyum.

Føroyska løgmálaráðið vildi hava lógina tikna av. Eitt uppskot til ríkislógartilmæli varð lagt fyri løgtingið tann 26. oktober 2001. Eftir nevndarviðgerð og álit er tað samtykt einmælt í løgtinginum 21. november 2001.

Í landsstýrisins viðmerkingum til ríkislógartilmæli og í nevndarálitinum frá Rættarnevnd løgtingsins, er dentur lagdur á, at talan er um avtøku av galdandi lóg. Og at onki skal setast í staðin.

Kortini velja danskir myndugleikar í Kunngerðarblaðnum B, hefti 5, 2003, at kunngera eina røð av ríkislógum og kunngerðum, sum viðvíkja danska hervaldinum í Føroyum. Uttan at hesar fyrst hava verið lagdar fyri landsstýrið og løgtingið til álitis.

Løgtingið viðger í løtuni eitt uppskot frá Javnaðarflokkinum um at taka lógirnar av aftur.

# Smádreingir fingu ringa samvitsku

**Tveir 14 ára gamlir dreingir hava tikið ábyrgdina av heimagjørdu fløskubumbuni, sum hevur kløkkað foreldur at smáum børnum**

FLØSKUBUMBA
*Ingi Rasmussen*

Tað fór sum ein skelkur gjøgnum føroyingar, tá ein heimagjørd bumba brast undir vogninum hjá einari dagrøktarmammu í Havn.

Eitt av hennara dagrøktarbørnum hevði funnið fløskuna í býnum, og tey løgdu hana undir vognin, tí tey ætlaðu at selja hana. Men tá tey komu inn í SMS, brast fløskan undir vogninum. Komið var fram til, at talan var um eina heimagjørda bumbu.

Saltsýra var fylt í fløskuna, og staniol varð lagt í hana. Ein vandamikil koktail, sum skaði kundi staðist burturúr, tí blandingin brestur.

Nú hava tveir 14 ára gamlir dreingir tikið sær ábyrgdina av vandamiklu dreingjalótunum. Dreingirnir fingu ringa samvitsku, tá teir frættu um hendingina í fjølmiðlunum. Teir søgdu foreldrunum frá, og tey søgdu síðan løgregluni frá, sigur Jan Fossaberg á Politistøðini í Havn við Útvarp Føroya.

Dreingirnir tóku saltsýruna í skúlanum og fyltu hana í fløskuna uttan fyri skúlan. Tá fløskan ikki sprongdist eftir lítlari løtu, sparkaðu teir hana inn ímillum nøkur trø og fóru avstað. Løtu seinni kom dagrøktarmamman við børnunum, sum funnu fløskuna. Vandin við hesari bumbuni er, at tú veitst ikki, nær hon brestir.

Dreingirnir eru avhoyrdir, meðan forledur og barnavernd vóru hjástødd. Teir eru yngri enn 15 ár, so meira hendir ikki. Vit kunnu bara vóna, at teir og onnur eru vorðin klókari.